

# Neistin er

**HONDBÓLTUR**

**Neistakvinnur hava havt stór sveiggj í sínum avrikum í hesum kappingarárinum. Maðurin, sum hevur havt evstu ábyrgdina, heldur, at liðið var best, tá tað av álvara ráddi. – Tað bar á mál, sigur Birgir Hansen**



Uni Holm Johannesen

– Liðið hevur verið í stórari menning alt kappingarárið. Vit vístu ikki meistaraspæl fyri jól, men hava verið sannførandi seinastu mánaðirnar. Vit vóru ikki besta liðið í føroysku kappingini í november, men tað eru vit í dag. Neistin var best, tá tað av álvara ráddi, og sjálvsagt er meistaraheitið uppiborið.

Tað sigur Birgir Hansen, sum hevur staðið á odda fyri besta kvinnuliðnum hjá Neistanum í hesum kappingarárinum. Hann og neistakvinnurnar vunnu sær rættin at spæla finalurnar um føroyameistaraheitið sum nummar tvey á stigatalvuni. Í finalunum bastu tær Stjørnuni.

**Lærdu til tað seinasta**

Ungu spælararnir í Neistanum lærdu til tað seinasta. Tað ásannar Birgir Hansen. Fyrsta finaludystin, sum varð spældur fyri 11 døgum síðani í høllini á Hálsi, vunnu klaksvíkskvinnur. Tá fekk Stjørnan eitt mál meira enn Neistin. Neistakvinnurnar lærdu eina rúgvu tann dagin.

– Vit tóktust fjálturstungnar tá. Úrslitið staðfesti, at tú tapir, um tú